## Klumman



**Rigmor Dam**
blaðkvinna

# Tá eg verði stór

Tá eg verið stór, fái eg mítt egna kamar. Eitt jomfrúbúr.

Har skal standa eitt stórt mahogni sminkuborð við stórum spegli. Og har er ein sovorin gardaroba, sum mann kann ganga inni í, við hyllum og hattaeskjum. Í horninum er eitt hondvask, sum hjá ommudidd á Hálsi, og so er eitt lekkurt skrivaraborð til farteldluna, og ein elegantur flatskíggi við óendaliga nógvum sjónvarpsrásum, og einari persónligari fjarstýring, sum bara aktar mítt fingramerkið. Tá eg verið stór, havi eg heimsins besta lítla stereoanlegg við internetradio, so eg altíð kann lurta eftir seinastu útvarpssendingunum á P1 og BBC og klassiskum tónleiki.

Tá eg verið stór fer alt at hava sítt egna pláss og tað verður ongantíð neyðugt at leita eftir nøkrum. Hvør taska og hvørt par av skóm hava sína egnu vøkru eskju við angandi silkipappíri, sum í amerikanskum filmum. Og tá eg lati meg í myrkabláa ullinta frakkan ein kaldan vetrardag, havi eg sjálvandi eitt lítið hylki til handskarnar, sum hóska perfekt til frakkan. Og stivlarnir eru altíð nýbustaðir og kosta eina millión.

Tá eg verið stór, havi eg mína egnu persónligu ókeypis tráðleysu telefon, sum altíð hongur sum eitt headset í oyranum. Og hon aktar eisini bara meg, tí hon kennir røddina. So kann eg alla tíðina tosa við vinkonurnar og mammu. Og vit fara at tosa nógv longri enn nú, og eg fari ikki at hava ilt í økslini, tí eg gangi alt kvøldið og haldi telefonini upp ímóti oyranum, meðan eg fylli uppvaskimaskinuna, leggi klæðir saman og uppá pláss, pakki skúlataskur og finni spildurnýggju Dior varrastiftina í lummanum hjá didduni, sum liggur í hornasofuni saman við vinkonunum og nývaskaðu klæðunum og venur violin, meðan miðlingurin leitar eftir gummistyvlunum í gongini, tí hann skal til ríðing, og tann elsti spælir drønfrá telduspæl, so vit hoyra ikki, hvat vit siga, og maðurin lænir líka mína teldu til at kjekka meyl og eplini kóka.. og..

Men, tá eg hugsi um tað, so verið eg nakað einsamøll, tá eg verið so stór. So eg andi bara djúpt inn og gleðist um hvørja lítla løtu, eg ikki eri stór...

umborð

# Úr góðum bergi brotin

**Tað er ikki bara sum at siga tað at vera útróðrarmaður í Sandoynni. Eingin keypir útróðrarfisk í oynni, og tí noyðast Richard Hentze og aðrir útróðrarmenn heilt inn á Toftir við fiskinum**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo



*- Eg veit, at gráur fiskur tekur betri gággu, men her suðuri hjá okkum fæst lítil og eingin gágga, tí her er so ringt til brim. Tú kanst fáa nakrar spannir, men onga rúgvu Mynd: Jens Kr. Vang*

Richard Hentze er útróðrarmaður og býr á Sandi. Hann hevur ein AWI STAR 35, sum hann læt byggja á bátaverksmiðju í Runavík í 2004.

- Mær dámar bátin ógvuliga væl. Um veturin royni eg mest við línu, men eg havi fimm svenskar snellur, sum altíð standa uppi í bátinum. Hetta eru fínar el-drivnar snellur, sum eg haldi er ein fyrimunur á grunnum vatni, tí tú kanst sløkkja motorin, meðan tú fiskar. El-skipanin til snellurnar koyrir fyri seg, so eingin vandi er fyri, at tú missur streymin til bátin annars.

Útróðrarmaðurin sigur, at tað hevur verið so lítið at fingið við snellu í longri tíð, og tí hevur hann at kalla bara roynt við línu.

- Á Norðhavinum fæst eingin fiskur longur um várarnar, og í fjør summar royndi eg eisini bara við línu.

Richard sigur, at onnur ár hevur hann gjørt góðar upsatúrar við snellu um summarið, men í fjør summar helt hann fram við línuni, hóast verri er at fáa egnarar í summartíðini.

- Eg havi onkuntíð ligið úti við snellu í einar 2-3 dagar í senn og havi ísað fiskin umborð.

Teir gomlu tíma ikki so væl at egna, tá ið veðrið er gott.

- Fleiri vilja heldur taka sær okkurt annað fyri í tí góðu tíðini, og onkur hevur bát og fer á flot. Tí egni eg ofta ein stóran part av línuni sjálvur um summarið, og tá verða seturnar og dagarnir eisini hareftir.

Richardi, sum er 50 ára gamal, hevur róð út at kalla alt sítt lív. Honum dámar væl lívið sum útróðrarmaður.

- Tú ert tín egni harri, og tú ert heima og kanst gera alt tað við hús, sum tú vilt.

Hann ásannar kortini, at skal lønandi vinna fáast burtur úr útróðrinum, er neyðugt at hanga í, tá ið viðrar.

- Jú, hetta krevur, at tú ert úti, tá ið líkindi eru. Miseydnast onkur dagur, noyðist tú bara at herja á aftur. Tað er eisini hetta, sum er spennandi við útróðrarvinnuni. Eingin dagur er eins.

Richard er úr góðum bergi brotin, sum vit plaga at taka til.

- Pápi mín var Mads Winther Hentze. Hann doyði fyri tveimum árum síðan, 80 ára gamal. Pápi førdi skip, bæði her heima og í Grønlandi, og hann var eisini skipari, tá ið eg fór mín fyrsta túr til skips í 1975. Hetta var miðskeiðis á sumri við Sjóborgini. Vit fiskaðu við snellu uppi við Steinin í Íslandi, flaktu og saltaðu.

Hann sigur, at hesin fyrsti túrurin vardi í einar tríggjar mánaðir, og tað gekk einki serligt at fáa fisk.

- Eg minnist allan túrin væl. Mítt arbeiði var sum hjálpar-maður í lastini, og eg var næstan deyður av sjóverki, sum vardi tað mesta av túrinum. Tað gjørdi ikki umstøðurnar betri, at eg var lastamaður og noyddist at liva við pumpuroykinum.

Richard var bert henda eina túrin við Sjóborgini, men hevur annars verið onkran línutúr og onkran túr við partrolara gjøgnum árini.

- Eg kann siga, at eg havi róð út at kalla alt mítt lív, og í eini 25 ár høvdu pápi mín og eg 20-tonsaran Syðraberg.

Mamman Jenny er ættað av Regi á Toftum, har góðir útróðrarmenn hava verið og framvegis eru í familjuni. Jenny fyllir 83 ár í summar.

Tað er ikki bara sum at siga tað at vera útróðrarmaður í Sandoynni í dag. Eingin keypir útróðrarfisk í oynni, og tí noyðast Richard og aðrir útróðrarmenn heilt inn á Toftir við fiskinum.

- Eg havi ein viðfestisvogn, sum eg koyri fiskin norður við, og tað er oftani dag um dag. Er meira at fáa, plagi eg at ísa fiskin umborð og fara til Miðvágs við honum.

Richard sigur, at áður kundi hann senda veiðina inn á Toftir við Strandfaraskipum Landsins, og hetta var ein góð skipan, sum riggaði væl.

- Fiskurin fór norður, og vit fingu kassarnar suðuraftur, men í dag hava vit onga Strandferðslu í oynni. Henni er stórur saknur í, leggur hann aftrat.

Hann er altíð einsamallur á floti.

- Eg havi onkuntíð havt onkran við mær, men tað nyttar so lítið, tá ið fólk ikki eru tøk, tá ið farast skal. Hevur tú mann við tær, ert tú bundin at honum, men ert tú einsamallur, kanst tú loysa, tá ið tú vilt.

Spurdur um veiði, sigur Richard, at fiskiskapurin hevur verið á einari leið.

- Í seinastuni hevur veiðan ligið um 100 pund á línuna, men á seinasta túri fekk eg 150 pund á línuna. Eg setti 13 línur og fekk eini 1800-1900 pund. Størsti parturin av veiðini er hýsa, og hýsan er ógvuliga góð. Eg vil siga, at tað hevur eingin smá hýsa verið uppi í veiðini tey seinastu árini.

Richard letur væl at fiskaprísunum, sum hava verið ógvuliga góðir.

- Men nú í seinastuni hava prísirnir verið meira svikaligir. Vanliga hevur miðalprísurin fyri hýsuna ligið millum 15 og 16 krónur fyri kilo, men seinastu tvær seturnar er prísurin dottin niður á 9,50 krónur fyri kilo. Hetta er munandi minni, enn vit hava fingið í langa tíð, og eg veit ikki, hvør orsøkin er til prísfallið, leggur hann aftrat.

Richard egnir bara høgguslokk.

- Eg veit, at gráur fiskur tekur betri gággu, men her suðuri hjá okkum fæst lítil og eingin gágga, tí her er so ringt til brim. Tú kanst fáa nakrar spannir, men onga rúgvu.

Tað hevði eisini verið ógjørligt hjá honum at veitt agnið sjálvur, tá ið so nógv stríð er av at fáa fiskin á marknaðin.

- Nei, tað hevði verið vónleyst, sigur hann.

Honum dámar ikki egningar-traktina, sum nógvir útróðrarbátar brúka í dag.

- Eg haldi, at bátarnir fiska minni, sum seta úr trakt, og tí dámar mær ikki traktina.

Richard heldur tað vera spell, at so stór økir verða stongd á hvørjum vári fyri línuveiði.

- Eg hugsi um økini her sunnan fyri hjá okkum, sum verða stongd í gýtingartíðini og langt út á várið. Men soleiðis hevur tað nú verið í fleiri ár, og neyvan gerst nakað við tað, sigur Richard Hentze, útróðarmaður.